# Ekkó av G!




*Arbeitt hevur verið við spitaranum í botni dagarnar uppundir festivalin. Festivalskrivstovan var deyðari enn vanligt, meðan sjálvur festivalurin var*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fyribils metingarnar hjá fyrireikarunum aftanfyri G! festivalin benda á, at millum 3-4000 fólk hava vitjað festivalin hvønn dagin**

G! FESTIVALURIN
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**G!, Syðrugøta:** Mjørkin hongur tungur niður yvir fjøllini, meðan nakrir terradropar, sum seinni gerast til eitt æl og bæði tvey, detta spakuliga niður á tekjurnar, vegin, sandin og øll tey vitjandi í bygdini. Bygdin er á tremur við fólki. Glað fólk í øllum aldri eru at síggja. Tað er fríggjadagur á G!

Mitt uppi í bygdini standa eini reyð hús. Tey síggja út sum eini púra vanlig sethús, men innanfyri hevur verið koyrt við hátrýsti seinastu dagarnar. Inni í hesum húsunum hevur tann størsti parturin av arbeiðnum í sambandi við G! festivalin nevniliga gingið fyri seg.

* * *

Nú G! festivalurin er liðugur, er tað ikki sørt, at tað kennist tómligt hjá teimum, ið hava arbeitt við spitaranum í botni seinastu vikurnar.

Syðrugøta var um vikuskiftið karmur um størsta tónleikatiltak av sínum slag her á landi, og var bygdin eisini vitjað av millum 3-4000 fólkum hvønn dagin. Hetta eru tó enn bert leystligar metingar.

– Endaligu tølini eru ikki gjørd upp enn, men vit hava selt tað, vit ætlaðu at selja, sigur Jón Tyril, formaður fyri G! festivalin.

Um vikuskiftið vóru millum 3 og 400 fólk í sving báðar dagarnar, og tilsamans arbeiddu tey eini 1.300 arbeiðstímar.

* * *

Inni í teimum reyðu sethúsunum er næstan heilt deytt. Tónarnir frá norska bólkinum, Gåte, hoyrast um alla bygdina. Eisini niðan í G! skrivstovuna.

Inni í stovuni er høvuðsskrivstovan. Har standa teldur lið um lið. Mitt á gólvinum stendur ein kombinerað fax- og kopimaskina.

Á veggunum er stórt sæð onki prýði uttan tær mongu G! plakatirnar. Á tí eina vegginum hanga nakrar viðvendar plakatir, har tær ymisku praktisku uppgávurnar eru deildar út millum arbeiðsfólkið. Hetta er eisini av orsøkunum til, at so friðarligt er á skrivstovuni henda fríggjadagin. Flest øll hava úr at gera við uppgávum, og fríløturnar ið eru, verða brúktar til at njóta tann nógva og fjølbroytta tónleikin.

Mitt á gólvinum liggja framvegis stórir bunkar av óbrúktum G! plakatum. Kanska tær framvegis kunnu brúkast til okkurt. Um ikki annað til praktiskar uppgávur.

Festivalheimasíðan verður dagførd leypandi – so hvørt sum ein bólkur hevur verið á pallinum. Nú verður arbeitt við at viðgera myndirnar soleiðis, at tær eru klárar at leggja út á netið saman við ummælinum av sjálvari konsertini.

* * *

Fyrireikararnir eru væl nøgdir, nú sjálvur festivalurin er yvirstaðin. Tað hevur gingið væl í hond, og sum heild hava fólk latið væl at.

– Fyri meg er tað týdningarmesta, at luttakarar og tónleikarar eru væl nøgdir. Reaktiónirnar, vit hava fingið higartil, benda eisini á, at so er, sigur Jón Tyril.

Fleiri hundrað fólk hava arbeitt ígjøgnum allan festivalin, og sigur formaðurin fyri G!, at í ár hevur borið betri til at sleppa undan mistøkum, sum millum annað vóru á festivalinum í fjør.

– Til dømis riggaði tað við vaktarhaldi nógv betri í ár enn seinasta ár. Okkurt varð eisini strammað upp frá fríggjadegnum til leygardagin. Millum annað vísti tað seg, at nógv fólk høvdu glasfløskur við. Tað royndu vit so at rætta uppá dagin eftir, sigur hann.

Toppskorarin við áhoyrarum á festivalinum gjørdist Lisa Ekdahl. Hon hevði nógv flest fólk.

Jón Tyril sigur, at tónleikararnir hava verið væl nøgdir við viðurskiftini og konsertirnar. Og bæði Kashmir og Lisa Ekdahl vóru yvirraskað av, at áhoyrararnir dugdu tekstirnar til teirra sangir.

Tíðarætlanin helt sum heild eisini væl. Fríggjadagin vóru tiltøkini eitt sindur seinkað, men leygardagin koyrdi alt, sum tað skuldi.

– Tað er kanska eitt sindur undarligt at hava arbeitt so hektiskt fram ímóti einum tiltaki, sum so knappliga bara er yvirstaðið, ásannar Jón Tyril.

– Eg eri ikki ordiliga komin niður aftur á jørðina enn, og nú skal alt tað seinasta eisini gerast viðvíkjandi upprudding, eftirmeting og so framvegis.

Jón Tyril viðgongur, at tað ber ikki til at hava nógv fleiri fólk á G! festivali, enn tað, ið var um vikuskiftið, tí Syðrugøta er ikki nóg stór.

– Festivalurin kann gerast eitt sindur størri. Men vit hava ikki ætlanir um at gera hann so nógv størri – heldur betri, sigur hann.

Tá alt er komið uppá pláss við eftirmeting, upprudding og uppteljing, verður farið við góðum treysti undir fyrireikingarnar av einum nýggjum G!festival.

* * *

Ferðslan inn og út úr G! skrivstovuni er støðug. Ikki so nógv henda festivalfríggjadagin eins og undanfarnar dagar, verður sagt.

Fartelefonir kima í tíð og ótíð, meðan teldurnar standa tendraðar døgnið runt.

Ein fyrrverandi landsstýriskvinna kemur inn at fáa sær ein kaffimunn, og brádliga standa tvey í hurðini við tveimum madrassum.

Ein fartelefon ringir aftur. Hesuferð eru tað nøkur av hjálparfólkunum, sum ikki sleppa inn á festivaløkið. So verður onkur av skrivstovuni noyddur at fara og geva eina hjálpandi hond.

Nú er norski bólkurin liðugur at spæla, og eitt sindur av lívi er komið í skrivstovuna. Onkur er komin inn at heita seg eitt sindur, sjálvt um veðrið er heilt gott. Hjá onkrum er friður nú eina løtu inntil næsta navnið fer á pallin.



# Prísurin á fiski kundi verið munandi hægri

**– Tað eru ikki bara tímalønirnar, sum beina fyri okkara kappingarførið. Eitt tað mest umráðandi er at fáa betri flutningssamband út í heim, sigur Leif Høj, fiskaseljari**

FISKAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað eru tær fesku vørurnar, sum skapa dynamikk í prísinum, men tann tann dynakikkin gava vit ikki við teimum flutningsøguleikum, sum nú eru. Tí verður ikki meiri fiskur virkaður í Føroyum, sigur Leif Høj, fiskaseljari*

*Myndina tók Rúna Sivertsen*

– Bóru føroyingar seg rætt at, kundi avreiðingarprísurin á fiski verið munandi hægri enn hann er nú.

Tað sigur Leif Høj, fiskaseljari á Fofish í Runavík.

Hann ásannar, at kappingarførið hjá føroysku fiskavirkjunum er ikki serliga gott.

Men hann staðfestir eisini, at tað er skeivt at geva tímalønunum alla skyldina fyri, at kappingarførið er so vánaligt.

– Tá ið tosað verður um kappingarførið, verður alt ov nógv hugsað um tímalønirnar. Sjálvsagt hava tær stóran týdning, men tær eru verri enn so øll orsøkin til, at vit hava so stórar trupulleikar.

Leif Høj heldur, at tað, sum eitt, sum hevur eina størstan týdningin fyri kappingarførinum, er, at vit fáa betri flutningsmøguleikar ímillum Føroyar og umheimin.

– Øll vita, at tað eru tey fesku fløkini, sum bera prísin og tí nyttar tað onki at koma á marknaðin við ov gomlum fiski, sigur fiskaseljarin í Runavík.

Hann vísir á, at fiskur, sum verður avskipaður í Føroyum mánadag, er ikki frammi á marknaðinum fyrrenn hósdag og fiskur, sum verður avskipaður hósdag, er ikki frammi, fyrrenn mánadag.

Fiskur, sum verður avreiddur týsdag, verður ikki frammi fyrrenn mánadagin.

– Á nógvum marknaðum kunnu vit sostatt bara levera eina ferð um vikuna. Hetta er er eisini galdandi fyri okkara høvuðsmarknað fyri upsa og kongafisk, sum er tann týski.

– Hetta er burtur úr vón og viti og er ein stórur bági fyri kappingarførið.

Leif Høj samanber støðuna í Føroyum við Ísland, har tað oftast ber til at hava tey fesku fløkini á marknaðinum 24 tímar ella 48 tímar eftir at hann er avreiddur.

– Hetta gevur íslendingum ein sera stóran kappingarfyrimun, tí keyparin er sinnaður at betala fleiri krónur eyka fyri kilo av teimum daggomlu fløkunum.

Sostatt staðfestir Leif Høj, at skulu vit tosa um at bøta um kappingarførið, nyttar lítið bara at hugsa um um proformasølurnar.

Hann heldur eisini, at fólk fyri ein stóran part hava misskilt støðuna, tí fiskurin verður allur boðin út í Føroyum áðrenn.

– Men bara at hugsa um hesar proformasølurnar, loysir ongan trupulleika. Tað fer ikki at føra til, at meiri fiskur fer at verða arbeiddur í Føroyum, tí virkini hava ikki ráð at keypa kortini.

Hann nevnir hýsuna sum eitt dømi.

– Hýsan er so smá, at tey føroysku virkini fáa ikki virkað hann. Tí fer hon aloftast av landinum. Tað sama er galdandi fyri ta smáu hýsuna. Hetta hevur onki við proformasølur at gera.

## Betri flutning

Hann sigur, at eitt tað størsta framstigið fyri kappingarførið í Føroyum vildi verið at fingið so góðar flutningsmøguleikar, at tíðin frá tí, at fiskurin verður avreiddur, til hann er keyparanum í hendi, verður munandi stytt.

– Tí eiga møguleikarnir at verða kannaðir fyri at føroyingar kunnu útflyta fesk fløk við flogfari ella við skjóttgangandi skipi.

Hann heldur, at skuldi heldur onki verið í vegin fyri at bæði vinnan og landið voru við í eini slíkari ætlan, sum hevði til endamáls at tryggja okkum betri flutningsmøguleikar við umheimin.

– Hetta vildi verið eitt heilt avgerandi framstig fyri okkara kappingarførið.

At fiskurin er so gamal, áðrenn hann kemur á marknaðin, sæst týðiliga aftur á prísinum.

Leif Høj sigur, at hvat dygd viðvíkur, er hvør dagur á sjónum sum tríggir dagar á landi, tí tá ið fiskurin er avreiddur, versnar hann skjótt.

– Viðskiftafólkini krevja eisini meiri og meir, at fløkini er so fesk sum gjørligt og helst skal hann ikki vera meiri enn 48 tímar.

Leif Høj heldur, at føroyingar eiga nú at seta seg niður at finna fram til, hvussu vit kunnu leggja so til rættis, at tað ber til at hava fiskin á marknaðinum 48 tímar eftir, at hann er avreiddur.

Hann sigur, at hann kann væl ímynda sær, at hetta hevði ført við sær, at prísurin á flaki á marknaðinum hevði hækkað munandi.

Hann sigur eisini, at verður talan um at seta forboð fyri at flyta óvirkaðan fisk av landinum, verður tað at arbeiða eftir hæli.

– Tað er ongin loysn og tað fer eisini at føra til, at fiskaprísurin fer at vera trýstur niðureftir og tað tænir avgjørt ikki fiskiflotanum, sum longu nú hevur tað tungt.

– Veruleikin er eisini, at tað er fiskur, sum verður mest virðisøktur við at flyta hann heilan av landinum. Talan er eitt nú um smáa hýsu, tungu, reyðsprøku og annað, sum ikki kann virkast í Føroyum.

– Tí fáa vit mest burturúr hesum fiskasløgunum við at útflyta tey óvirkað av landinum.

– Tað, sum vit hava brúk fyri, er dynamikk á marknaðinum, sum ikki er til staðar í dag. Og tað fáa vit ikki við frystum vørum, har prísirnir eru avtalaðir langt frammaundan. Vit fáa bara dynamikk í við feskum vørum, har marknaðurin arbeiðir frá degi til dags.

– Tað er feski marknaðurin, sum skapar dynamikkin og tað er alt avgerðandi fyri framtíðini hjá fiskivinnuni.

– Grundgevingin fyri at útflyta óvirkaðan fisk, er, at hann skal vera so feskur sum tilber, tá ið hann verður skorin og kemur á marknaðinum.

– Men í løtuni eru flutningsmøguleikarnir so vánaligir, at vit fáa ikki tey fesku fløkini nógv skjótt á marknaðin. Tí verður ikki meiri arbeitt í Føroyum, sigur fiskaseljarin.

## Útlendingar til Føroya

Annars vísir Leif Høj á, at hóast kappingarførið ikki er tað besta, ber tað hóast alt eisini til at fáa útlendingar at avreiða í Føroyum av og á.

Soleiðis hevur týski trolarin, J. von Colln, avreitt eini 600 sentnarar í Havn hesa vikuna, sum ymisk virki í Føroyum hava keypt og sum sostatt allur verður arbeiddur í Føroyum.

